# Röða
# forseta Íslands
# Guðna Th. Jóhannessonar
# til veitsludögurða
# hjá Föroya lögmanni
# Tórshavn
# Föroyum
# 17. mai 2017

Kæri lögmaður,
ráðharrar, tingmenn, sendimenn,
aðrir góðir gestir!

Eg takki fyri ta góðu móttöku, sum vit bæði Eliza og fylgi okkara hava fingið her í Föroyum. Vit hava ferðast víða, notið serstaka náttúruvakurleikan her í Föroyum og góða sinnalag fólksins, sum her býr. Í samröðum mínum við landsmenn her havi eg hoyrt, hvussu væl íslendingum dámar í Föroyum, og hvussu væl teir eru dámdir.

Tað er mær ein heiður at siga, at vit halda okkum líkjast föroyingum á mangan hátt - tað er ikki leiðiligt at líkjast, sigur íslendskt orðatak. Sanniliga er tó galdandi hjá okkum eins væl og hjá tykkum, at fólkið er ikki alt stoypt í sama formi, og soleiðis eigur tað at vera. Í framkomnum og sterkum fólkaræðissamfelagi eiga öll at kunna droyma egnar dreymar, seta sær egin mál, bera fram egna hugsan, og liva eins og tey vilja, so leingi tey ikki skaða onnur. Víðskygni, tollyndi og fjölbroytni eiga at vera aðalsmerki nútíðarsamfelagsins, „að hver lifði sem vildi“, sum tað stendur í Færeyinga sögu.

Kortini er tað nú einaferð so, at tá ið vit líta at hvörjum öðrum sum tjóðir, halda vit okkum síggja ávís eyðkenni, sum lýsa alt fólkið. Eittnú hava tit föroyingar leingi kallað okkum íslendingar „jauarar“, tí vit altíð og stund siga “já “ og “jæja, já já” og “jááá”. Föroyingar tykjast yvirhövur at halda okkum íslendingar vera jaligar av lyndi. Fyri stuttum las eg, at ein föroyingur lýsti grannar sínar við hesum orðum: „Eg havi altíð hildið, at íslendingar eru nýfiknir, sinniligir, djarvir, háfloygdir men tó jarðbundnir. Teir eru stoltir, arbeiða nógv

og eru treiskir, og so havi eg altíð hildið, at teir lættliga gerast ovurhugaðir, tí teir tora at seta alt í váða, tora at detta, men reisa seg altíð aftur.“

Já, eyðvitað dámar okkum at fáa slíkt rós. Hinvegin eiga vit ikki at gloyma góða, gamla orðatakið, at vinur er hann, ið vomm sær. „Tað lögna við íslendingum er,“ segði ein föroyingur nýliga, „at tað er eins og teimum dámar at liva eina jojo-tilveru: fulla ferð upp og eins skjótt niður.“ Ja, kanska eru vit heldur „jo-joarar“ heldur enn „jauarar“, tá ið vit hugsa um tað.

Men hvat við tykkum, góðu föroyingar? Hvat siga íslendingar um grannar sínar fyri eystan? Í Föroyingasögu, sum skrivað var í Íslandi í trettandu öld, verður sagt frá mongum hetjum. Tróndur í Götu, sum stríddist ímóti veldi og skattainnheinting noregskongs, var „reyðhærdur og fröknutur í andliti, fríður til útsjóndar“. Fíggindi hans og hirðmaður kongs, Sigmundur Brestisson, var „frágerðamaður á vökstri, til styrki og evni“.

Ja, leingi hava vit róst tykkum föroyingum. Á okkara dögum hava vit eisini róst tykkum fyri at hava varðveitt so mong gomul hús og dugað so væl at fáa nýbygningar at falla inn í umhvörvi og landslag. Harafturat hava vit övundað tykkum fyri, at tit megnaðu at halda hin forna dansin gangandi og kvæðini livandi – og öll í tjóðbúna! Greitt er, at tit bera virðing fyri sögu og mentanararvi tykkara.

Og kelinavn hava vit eisini um tykkum! Tey, sum nú eru gomul heima í Íslandi, kundu viðhvört kalla tykkum „negvar“, tí tað ljóðaði fyri teimum, sum var annaðhvört orð, tit sögdu, „nógv“. Í einum reykjavíkarblað stóð at lesa um miðja farnu öld, at tað var so nógv vátveður í Föroyum – og föroyingar so óvanir við brenniterra – at teir fingu krím og ilt í magan, um teir gingu turrir um föturnar ein heilan dag.

Tað kom vist eisini fyri, at íslendingar hildu föroyingar vera minni kappingarhugaðar enn teir sjálvir, ikki eins nógv „jo-joarar“, siga vit bara. Eg skilji, at summir föroyingar eru samdir í hesum og halda, at íslendingar kunnu læra föroyingar at hava „störri áræði“, eins og ein föroysk kona tók til orðanna. Hon legði tó afturat nakað, sum samsvarar við tað, eg segði íáðni, at „föroyingar kunnu læra íslendingar at fáa eitt sindur av sambandi við jörðina av og á.“

Ja, kæru vinir! Skal eg draga samanum og siga heilt stutt, hvussu íslendingar lýsa tykkum föroyingar, gerst tað best við hesum orðum: „Þeir eru vinir okkar.“ Tann vinskap hava tit mangan sýnt. Í gjár skoðaðu vit nýggjan minnisvarða her í Tórshavn, sum er gáva frá Súðavíkurhreppi og Ísafjarðarbæ, givin í takklæti fyri studning tykkara og samhug, eftir at skalvalop raktu bygdirnar Súðavík og Flateyri árið 1995. Fæið, sum tit savnaðu inn, kom okkum sera væl við, men tó sigi eg sum Gunnar á Líðarenda í forðum, at góðar tykir mær gávur tykkara, men meiri tykir mær vinskapin verdan.

Eg má nú siga, at ikki tykir mær skorta áræði í hesum samfelagi. Vigdís Finnbogadóttir og Ólafur Ragnar Grímsson, sum röktu forsetaembætið undan mær, vitjaðu eisini í Föroyum í síni tíð. Tey hálovaðu bæði dugnaskapi og ágrýtni föroyinga, og tað sama geri eg. Í samráðingum um felags fiskastovnar í Norður-Atlantshavi halda vit íslendingar viðhvört, at kappingarhugur föroyinga gongur í so langt, men tað er ein onnur söga!

Kæru vinir! Nú mugu vit vera bjartskygdir og hyggja frameftir, framtíðin bíðar við öllum sínum möguleikum, avbjóðingum og dreymum um gott mannlív, har hvör finnur nögdsemi í góðari samveru við onnur. Eg biði tykkum reisast úr sæti, lyfta glasinum og skála fyri bröðra- og systralag íslendinga og föroyinga, sterku vinatjóðunum í útnorðri.